Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Seyður og ferðslutrygd

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógvur seyður árliga verður koyrdur yvir á føroysku landsvegunum?
2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógv ferðsluóhapp henda árliga, tí seyður er á landsvegunum?
3. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvør metti kostnaðurin er, um farið varð undir at stika við landsvegir, har tað ikki longu er gjørt, so seyður ikki sleppur á landsvegirnar?

Viðmerkingar:
Áhugavert uppskot var á Ungdómstinginum, har skotið varð upp at fáa seyðin av landsvegunum fyri at bøta um ferðslutrygdina.

Seyður er til ampa fyri ferðsluna, og vandi kann standast av tí. Men tað snýr seg eisini um djóravælferð og at tryggja seyðin ímóti at verða yvirkoyrdur.

Fyri at fáa nærri greiðu á hesum viðurskiftum verður hesin fyrispuringur settur.

Á Løgtingi, 9. februar 2022

Beinta Løwe Jacobsen